## Heiðraðu Hvassa

Á móttøku í Eydnuni á Oyrarbakka í gjár, vóru fólk úr øllum Sundalagnum savnað, fyri at heiðra róðurskvinnunum á Hvassa. Genturnar gjørdust føroyameistarar í 5-mannafarsróðrinum hjá gentum, og settu eitt flott punktum fyri eitt frálíkt ár, tá tær vunnu ólavsøkuróðurin. Á samkomuni helt millum annað borgarstjórin, Heðin Zachariassen, røðu fyri røsku gentunum umborð á Hvassa. Frá vinstru á myndini eru genturnar Anetta Eidesgaard, Ingibjørg Reinert, Alda Magnussen, Ranveyg Joensen, Fríða við Streym, Kristianna Kruse í Kollsbyrgi og Svanna Dam Joensen.



## FM-kapping fyri vaksin

Leygardagin verður FM-kapping í frælsum ítrótti fyri vaksin á Svangaskarði. Kappast verður í greinunum 100 m, 400 m, 1500 m, 5000 m og longdarlop. Fyri at taka lut í kappingini er krav, at luttakarin er fyltur 15 ár, og at viðkomandi er limur í einum av feløgunum fyri frælsan ítrótt. Seinasta freist fyri tilmelding á hóskvøldið, og fer tilmeldingin fram á HYPERLINK "http://www.athletics.fo" www.athletics.fo.

# Rógvi spældi móti Middlesbrough

**Tað gekk væl hjá Rógva Jacobsen, tá hann fekk ein hálvleik móti Premier League-felagnum Middlesbrough**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Frammanfyri 5000 áskoðarum spældi Rógvi Jacobsen í gjár ein hálvleik móti Premier League-felagnum Middlesbrough. Carlisle United, sum liðið, ið Rógvi venur við, eitur, er í triðbestu ensku deildini og tapti venjingardystin 0-2.

– Teir vóru betri enn vit, eingin ivi um tað. Men vit høvdu nakrar kjansir og áttu eisini eitt brotsspark, sum vit ikki fingu, sigur Rógvi Jacobsen úr telefonini í Onglandi í morgun.

Tá Rógvi Jacobsen kom til Onglands mánadagin var longu greitt, at um hann kom á vøllin, so fekk hann ikki meiri enn ein hálvleik. Tað var partur av avtaluni. Rógvi Jacobsen byrjaði dystin móti Middlesbrough í álopinum, og varð tikin út í steðginum.

– Tað gekk fínasta slag, haldi eg. Eg var nógv við í spælinum og avsluttaði eisini nakrar ferðir. Eg haldi eisini, at hinir lótu bara væl at mínum avriki, sigur Rógvi Jacobsen.

### Hægri støði

Sterki føroyski áleyparin letur at, at støðið har hann nú roynir seg, er nakað hægri enn í Føroyum.

– Ferðin er ein heilt onnur og tað krevst eisini størri orku av einstøku leikarunum, sigur Rógvi Jacobsen. Hann skal venja við Carlisle United í dag og í morgin, og kemur síðani heimaftur. Rógvi Jacobsen sigur, at Carlisle United hevur víst áhuga fyri honum í longri tíð nú.

– Men enn er ov tíðliga at siga, um nakar sáttmáli spyrst burturúr, sigur hann.

### Stórur maður

Sunnukvøldið skrivaði almenna heimasíðan hjá Carlisle United um Rógva Jacobsen. Teir vistu millum annað at siga, at Rógvi Jacobsen hevur spælt sum yrkisleikari hjá bæði SønderjyskE og KR í Reykjavík. Teir skriva um landsdystirnar hjá Rógva Jacobsen, málini hann hevur skotið og síðani er ein leinkja til málið, Rógvi Jacobsen gjørdi móti Italia.

Í stuttari viðmerking sigur venjarin Neil McDonald, at Rógvi er ein altjóða leikari, sum hevur skotið nøkur fín mál á høgum støði eisini.

– So hann er avgjørt verdur at hyggja at. Hann er ein stórur maður og nú skulu vit síggja hvat hann kann, og so taka vit tað har frá, sigur altso Neil McDonald, venjari hjá Carlisle United.




*Venjarin hjá Carlisle United lýsir Rógva Jacobsen sum ein stóran mann við altjóða royndum*

# Bar betri til hjá U-17

**Føroysku U-17 dreingirnir taptu í gjárkvøldið 2-0 ímóti Danmark, eftir at danir í hálvleikinum høvdu verið á odda við einum máli**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í fyrradagin løgdu U-17 dreingirnir rygg til 6-0 tap ímóti Noregi í NM kappingini, sum í hesi vikuni er í Jyllandi. Í gjárkvøldið spældu Føroyar ímóti Danmark, og hóast talan aftur hesa ferð varð um tap, so vóru avrikið og úrslitið betri, enn tey vóru mándagin.

Í Ikast vann Danmark 2-0. Málini skoraðu teir í 24. og í 41. minutti. Seinna málið skoraðu danir í fyrsta álopinum í 2. hálvleiki. Málskjúttarnir hjá Danmark vóru Mahmut Cagri Erdem og Martin Lund Pedersen.

Sambært FSF heimasíðuni vóru danir skjótir, og teir høvdu góðan førleika við bóltinum. Hesa ferð eydnaðist betri enn mánadagin at tetta fyri uppspælinum úti í síðunum.

Í dag er frídagur. Seinasta umfarið í bólkaspælinum verður hósdagin. Tá skulu Føroyar spæla ímóti Belgia á Haderslev stadion. Í gjárkvøldið vann Belgia 1-0 á Noregi.

Undan síðsta umfarinum er støðan í bólki A tann, at Danmark og Belgia hava 4 stig í part, Noreg hevur 3 stig, og Føroyar hava einki stig fingið.

Í gjárkvøldið var føroyska liðið soleiðis mannað: Teitur Gestsson, KÍ, Monrad H. Jacobsen, NSÍ (Eli F. Nielsen, FSV04, 57.), Sørmund Kalsø, KÍ, Viljormur Davidsen, NSÍ, Dánjal Pauli Lervig, KÍ, Jógvan Rói Davidsen, HB, Heini Vatnsdal, VB/TB (Karl Løkin, NSÍ, 31.), Hallur Hansson, HB (Kristin R. Mouritsen, 69.), Hanus Mortensen, VB/TB (Bjarti Hansen, FSV04, 35.), Róaldur Jacobsen, B36 (Jens M. Jensen, EB/Streymur, 62.), Jóan Símun Edmundsson, B68.

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: Thomas J. Thomsen, HB og Mikal Jespersen, VB/TB.

Í bólki B vóru úrslitini í gjárkvøldið Ísland-Svøríki 0-1 og England-Finland 2-1. Støðan í Bólki B eftir tvey umfør: England 6 stig, Svøríki 4 stig, Finland 1 stig og Ísland 0 stig.

Hósdagin er skráin í bólki B: England-Svøríki og Finland-Ísland.

Leygardagin verður spælt um plaseringarnar. Føroyar skulu spæla um 7. plássið. Tann dysturin verður á Hedensted stadion klokkan 11.00. Úrslitið millum Finland og Ísland hósdagin verður avgerandi fyri, hvør av hesum fótbóltstjóðunum verður mótstøðuliðið hjá Føroyum leygardagin.

Venjarar hjá føroyska U-17 landsliðnum eru Pætur S. Clementsen og Finn Johannesen.